## Flýggja í Somalia

Flóttafólkastovnurin hjá ST, UNHCR, sigur, at síðani á nýggjárinum eru umleið 63.000 fólk í Somalia noydd at flýggja frá húsi og heimi. Samstundis halda teir hørðu bardagarnir millum stjórnarherin og uppreistrarmenn fram í høvuðsstaðnum Mogadishu, og umleið 14.000 fólk eru flýdd haðani tær báðar seinastu vikurnar. UNHCR sigur, at nú eru umleið hálv onnur millión flóttafólk í Somalia. Harafturat koma umleið 560.000 somaliufólk, sum eru flýdd av landinum, og sum halda til í flóttafólkalegum í Kenya, Etiopia og Jemen.



# 13 kvinnur á ting



*Siv Friðleifsdóttir, altingskvinna, er errin av, at so nógvar kvinnur standa við róðrið í Íslandi. Hon ivast ikki í, at tað eisini hevði eydnast at fingið javnstøðu í føroyskan politikk um flokkarnir settu sær tað sum mál*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Skulu Føroyar sammetast við grannalondini, skal talið av tingkvinnum vera minst 13. So flokkarnir hava 2 ár at fyrireika seg í. Hetta sigur Siv Friðleifsdóttir, íslenskur altingslimur, sum vitjar Føroyar**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Skulu Føroyar upp á støðið hjá Danmark mugu vit upp um 38 prosent í kvinnuumboðan.

Sostatt skulu í minsta lagi 13 kvinnur veljast inn, ella 6 fleiri enn við seinasta val.

Hetta var ein av boðskapunum í fyrilestrinum hjá Siv Friðleifsdóttir, íslendskum altingslimi, sum er gestur hjá Norrøna Felagnum í Føroyum í hesum døgum.

Heitið á fyrilestrinum í Norðurlandahúsinum týskvøldið var „Politikari – ber tað til á høgum hælum“, og snúði hann seg bæði um javnstøðuna í Íslandi, um persónligar royndir í politikki, og um hvussu vit í Føroyum kunnu koma fram á javnstøðuleið.

### Gongur undan

47 ára gamla Siv Friðleifsdóttir varð vald inn á ting í 1995 og hevur verið ráðharri í sjey ár tilsamans. Eitt nú í umhvørvis- og heilsumálum. Hon hevur øll árini verið sera virkin í norðurlendskum samstarvi og í javnstøðumálum, har hon var millum stigtakararnar til íslendsku nevndina, sum svarar til føroysku Demokratia.

### Kvinnurnar rudda

– Tíbetur hava vit kvinnur í politikki – annars var ongin at rudda upp eftir monnunum.

Orðini eigur Høgni Djurhuus, skrivari í Norrøna Felagnum í Føroyum, sum bjóðaði vælkomin til tiltakið við Siv Friðleifsdóttir. Og hann dróg fram dømini um Vigdis Finnbogadóttir, Maritu Petersen og nú aftur í Íslandi, har kvinnurnar koma framat valdinum, tá alt er farið á heysin.

Hetta sæst serliga væl aftan á seinasta altingsval, sum var í úrtíð í 2009. Tá gjørdist javn“støðan“ tann, at kvinnuparturin kom upp á 43 prosent, sum er met í Íslandi. Á valinum í 2006 var kvinnuparturin 31,7 prosent. Eisini kunnu vit nevna, at kvinnuumboðanin í verandi stjórn er 50 prosent, forsætisráðharrin er ein kvinna, Jóhanna Sigurðardóttir, tingformaðurin er ein kvinna, Ásta Ragnheiður Jóhannesdóttir, og av teimum 6 varatingformonnunum eru fimm kvinnur.

So ongin ivi er um, at kvinnurnar veruliga hava tikið valdið í Íslandi – saman við mannfólkunum sjálvandi.

### Nógvir stuðulsbólkar

Kvinnuligu politikkararnir í Íslandi hava nógv samstarv sínamillum tvørtur um floksmørk. Eisini hevur hvør einasta tingkvinna ein